# lkið kann fara





*Alt er gjørt so at atkomumøguleikarnir til Viðareiðis kirkju gerast so góðir sum gjørligt. Men tann estetiski parturin verður ikki gloymdur*

## Kirkjugøtan

Í kenda sálminum eftir Grundtvig »Kirkjan hon er eitt gamalt hús, stendur, um tornini falla« og í týðing Jákup Dahls frá 1925 verður sungið soleiðis í seinasta ørindinum:

*Gævi tá Guð, ið hvussu er,*
*altíð, tá klokkurnar kalla,*
*fegið til kirkju fólkið fer,*
*samlynt um verðina alla!*
*«Verðin væl ei, men tit meg sjá,*
*alt, tað eg sigi, verður svá,*
*veri Guðs friður við øllum!*

Nú er vorðið lættari hjá øllum at fara í kirkju á Viðareiði.

aðum til kirkjuna. Her hava Essa og hansara menn stoypt upp í norðaru trappuna, eins og ein rampi er gjørdur við vestaru hurðina til koyristólar.

Umframt hesi arbeiðini hava teir gjørt forarbeiðið til tann næsta mannin – einum múrara, ið skal leggja flísar allan vegin runt um kirkjuna.

Henda góðveðursdagin í farnu viku, tá Sosialurin vitjaði arbeiðsplássið, vóru fimm mans til arbeiðis.

- Vit eru onkutíð upp í fimm mans, og aðrar tíðir færri. Men vit eru so altíð tveir mans til arbeiðis, sigur Essa.

### Fullkomuliga brekkaðir

Mikudagin vóru teir sum nevnt til arbeiðis við Viðareiðis kirkju. Frammanundan hesum hava teir havt nógv onnur arbeiðir ymsastaðni kring oyggjarnar, serliga í Klaksvík.

Her er talan bæði um smærri og størri arbeiði. Teir hava fríðkað rundan um hús, gjørt skráningar og hava eisini havt ymisk arbeiðir innan kloakkviðurskiftini, m.a. hjá Hvannasunds kommunu

- Beint nú er ein stór maskina í ferð við at velta eitt stórt øki hjá einum bónda úti á Norðoyri, greiðir Essa Petersen frá.

Arbeiðsfólkum hansara nýtast kortini ikki at stúra fyri morgindegnum, og at teir skulu ganga fyri einki í tørvur er á slíkari arbeiðsmegi, tí á ordralistanum eru fleiri onnur arbeiði, bæði í Klaksvík, Gøtu og aðrastaðni.

- Í Gøtu skulu vit leggja nýtt flag á eina tekju, sum reiv í ringum veðri í vetur. Og síðani eru fleiri garðar at gera, millum annað í Signabø.

- So tú skilir, at vit eru fullkomuliga brekkaðir – faktiskt allan vegin til jólar, sigur Essa við einum brosi.

> *Leygardagin komandi verður nevniliga ein brúðarvígsla í hesi norðastu kirkju okkara. Ein vígsla her og síðani eitt brúdleyp í ítróttarhøllini í Vestmanna sum man fara at spyrjast*

# Útróðrarmaðurin sum fór í land



*Essa Petersen í Norðdepli hevur verið útróðrarmaður í nógv ár. Nú koyrir hann lastbil og hevur fleiri mans í arbeiði. – Hitt lívið gjørdist ov strævið, sigur hann*

Hóast Essa Petersen hevur arbeitt á landi í nógv ár, er hann – enn – kanska mest kendur sum útróðrarmaður.

- Ja, eg livdi av hesum í samfull 10 ár, greiðir Essa frá.

Hesi árini rak hann ein útróðrarbát, og var haraftrat íðin talsmaður fyri rættindunum hjá hesum bólki. Hetta gav honum eisini mong álitisstørv hjá útróðrarmonnum.

Hann var eitt skifti formaður í Útróðrarfelagnum Eystan Múla, og var somuleiðis næstformaður í Meginfelagi Útróðrarmanna, ta tíðina sum Martin Strøm var formaður.

- Eg legðist uppá land fyri nøkrum árum síðani. Og orsøkin var hin einfalda, at eg orkaði ikki meiri.

- Tí, satt at siga: Mær dámdi hetta arbeiðið heilt ótrúliga væl, men tað er eitt stórt MEN: At skula drifta ein útróðrarbát í dag, og við øllum tí sum tað krevur, - ja, tað krevur sín mann, sigur Essa Petersen, sum gavst sum slíkur, tá hann rakk teimum 53 árunum.

Hóast hetta, leingist honum av og á aftur til hetta lívið: - Hetta var eitt sera stuttligt og spennandi lív, har eingin dagur var eins. Men, men - hetta gjørdist simpelthen alt ov strævið fyri meg!